# Flúgv bíliga frá London

Nú Atlantic Airways er farið at flúgva til London er góður møguleiki hjá føroyingum at koma sera sera bíliga út í heim frá London.

Feløg sum Easy Jet og Ryanair eru sokallað lágprísflogfeløg, og har kann ein ferðast fyri prísir frá 100-200 krónum. Tá er ongin matur ella drykkur við í prísinum, og kemur tú ov seint, er tú noyddur at keypa nýggjan ferðaseðil.

Orsøkin til at hesi flogfeløg eru so bílig er at tey ofta flúgva til flogvøllir, ið liggja uttan fyri stórbýarumráðini. Flogfeløgini flúgva eisini bara til vælumtókt pláss, so at tey ofta eru full av fólki.

Tænastustøðið er við øðrum orðum ikki serliga høgt, men um tú vil koma bíliga út í heim eru hesi flogfeløg perfekt.

Ì flestum førum ber bara til at keypa ferðaseðil á netinum. Her eru adressirnar til nøkur slík flogfeløg:

www.ryanair.com
www.easyjet.com
www.flyme.com
www.flynordic.com


























Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari